gult cyan magenta svart

FISKARØKTARI

Til alibrúk okkara á Gøtuvík søkja vit eftir fiskarøktara.

Sum fiskarøktari fært tú fyrst og fremst ábyrgdina av at fóðra fiskin. Tað vil siga, at síggja til at fiskurin veksur mest møguligt við minst møguligum fóðri.

Hetta merkir, at tað er ein fyrimunur, at tú hevur meira enn vanligan fólkaskúla og hevur ein ávísan talkunnleika.

Tað er týdningarmikið, at tú hevur áhuga fyri at skapa úrslit, hevur áhuga fyri lívfrøði, at tú ert røkin, og at tú dugir at venda tær í einum báti.

Vit bjóða tær eitt áhugavert starv við møguleika fyri menna teg sjálvan við skeiðum í eitt nú teldu, fiskarøkt og øðrum.

Tí rætta fólkinum kunnu vit bjóða eitt gott og vællønt starv.

Meira fæst at vita við at ringja til Jógvan Joensen á tel 211 152 ella Atla Gregersen á tel 333 257.

Umsóknir skulu sendast til: Pf. Luna, Postsbox 29, 510 Gøta.

Umsóknirnar skulu verða inni í seinasta lagi 12. mars. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

LUNA ER EITT STÓRT OG NÝMÓTANS ALIBRÚK, IÐ ALIR LAKS Á GØTUVÍK.

SANSIR TEL 355 355

LUNA

P.O. BOX 29 · FO–510 GØTU · FAROE ISLANDS
TEL +298 441002 · FAX +298 441766

LANDSVERKFRØÐINGURIN

Leiðari til maskindeildina

Starvið sum leiðari av maskindeildina hjá stovninum verður lýst leyst av nýggjum.

Maskindeildin hevur um hendi maskinamboð, skerv- og asfaltútbúnað, akfør o.a. hjá stovninum, umframt viðlíkahald av asfaltgoymsluna í Hósvík. Amboðini eru í nýtslu kring landið - mest í sambandi við gerð og hald av landsvegum. Maskinmiðstøð er í Kollafirði og annars smiðja á Lambareiði, í Øravík og Hvannasundi. Eini 25 fólk tilsamans eru knýtt til hetta virksemið. Smiðjumeistarar hava dagliga raksturin um hendi.

Arbeiðsuppgávur
Viðkomandi hevur samskipanina av smiðjunum um hendi og hevur ábyrgdina av hesum virksemi.

Í høvuðsheitum er uppgávan hjá deildini rakstur av smiðjunum, viðlíkahald av maskinamboðum og útbúnaði, eykalutagoymsla, innkeyp av amboðum, eykalutum o. øðr.

Førleikakrøv
Sóknast verður eftir maskinverkfrøðingi ella maskinmeistara og helst við royndum innan nevnda virkisøkið.

Setanarviðurskifti
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum og møguligum ummælum verða at senda Landsverkfrøðinginum, Postboks 78, 110 Tórshavn og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 12. mars 2001. Merkið brævbjálvan »Leiðari til maskindeildina«.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Óla M. Petersen, deildarverkfr., á tlf. 3113 33 (e-postur: oli@lv.fo ella lv@lv.fo) .

Fráboðan um umhvørvisgóðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan tann 8. februar 2001 við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og grein 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, hevur góðkent:

Smiðju hjá Sp/f á Krossbakka á Toftum

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til Føroya Landsstýri. Møgulig kæra skal sendast **Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Debesartrøð, FO-100 Tórshavn** í seinasta lagi 4 vikur frá dags dato.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2664, **Sp/f LIDO Seafood, 220 Skálavík.**

Viðtøkur broyttar: 07.02.2001.
Kapitalur: Hækking við kr. 1.500.000,00 til kr. 3.700.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 1.200.000,00 til kurs 100 og kr. 300.000,00 við skuldarumskifti til kurs 100.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra, av nevndarformanninum ella av tveimum nevndarlimum.

Skráseting Føroya tann 22. februar 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3117, **Sp/f Sproti, 625 Glyvrar.**

Viðtøkur broyttar: 15.02.2001.
Nýtt hjánavn: Sp/f Okkaraland (Sp/f Sproti)

Skráseting Føroya tann 22. februar 2001

Kristin Balle

KVASIR

r l r fer r um un
st tt r t n en el t

Teldukoyrikortfrálæran fevnir um 23 ferðir
4 undirvísingartímar. Gongur tú á skeið eina ferð um vikuna, verður hetta til 23 vikur.
KVASIR hevur eina skjótari loysn at bjóða:
T tir tv r ferðir u vi una
Mi u- og frígg a orgun l. 0 .00-12.00
og te ur tí s eiðini u 12 vi ur.

Farodane 01-01

S r

S eiðheiti	Dagar			
t r forr t	frí 09-03-2001	mik 14-03-2001	frí 16-03-2001	
Te st er	mik 21-03-2001	frí 23-03-2001	mik 28-03-2001	frí 30-03-2001
r ml uforr t	mik 04-04-2001	frí 06-04-2001		
o n r	mik 11-04-2001	mik 18-04-2001	frí 20-04-2001	mik 25-04-2001
t runn r	frí 27-04-2001	mik 02-05-2001	frí 04-05-2001	mik 09-05-2001
ms ft snet	mik 16-05-2001	frí 18-05-2001	mik 23-05-2001	
T teor	frí 25-05-2001	mik 30-05-2001	frí 01-06-2001	

SKEI STOVAN
KVASIR
A ODANE
TL . 20204

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg

Toll- og Skattstova Føroya
Stýrið

Ognaruppgerðin 2000

Í ár sendir Toll- og Skattstova Føroya ognaruppgerðir til allar skattgjaldarar, sum skulu kanna eftir, um upplýsingarnar, sum eru prentaðar á, eru rættar.

Bert tey, ið hava rættingar til ognaruppgerðina, skulu senda hana inn aftur.

Sí annars frágreiðing til ognaruppgerðina í bóklinginum "Skatturin 2000".

Toll- og Skattstova Føroya

Norðurlandahúsið í Føroyum

Sí SVF tekstvarp s. 650

VIÐMERKINGAR

Heðin Mortensen, næstformaður í Uttanlandsnevndini:

– Far endiliga til Nato, løgmaður!

Heðin Mortensen
Næstform. í uttanlandsnevndini

– Men ger tað á rættan hátt og gjøgnum teir stovnar og tær ráðharrastovur, sum sambært løgmanni sjálvum umsita hetta mál, sigur Heðin Mortensen, næstformaður í Uttanlandsnevndini, sum í dag endiliga loysir frá posabandinum um hvat veruliga fór fram á fundinum í Uttanlandsnevndini 8. február.

Heðin Mortensen vísir á, hvussu ótrúliga snildisliga Hergeir Nielsen klárar at brúka onnur til inntøku fyri sítt egna mistak, og hvussu hann við bara einum orði klárar at reingja niðurstøðuna av fundinum í Uttanlandsnevndini!

Eg skal hervið lýsa, hvussu ómetaliga einfalt hetta mál er, og eg haldi meg nú kunna rætta nøkur ting, nú tvey innanhýsis referat kortini eru útpenslaði uppá kvamsvís í fjølmiðlunum.

Málið byrjar við fundinum í uttanlandsnevndini 8. február. Fastur skrivari er sum vant Kristina Samuelsen, sum í fundarfrágreiðingini skrivar, at "Heðin Mortensen spurdi løgmann, hví hann ikki er farin sjálvur út og hevur kannað hetta málið, uttan at fara umvegis Ríkisumboðið!"

Hetta er púra rætt, tí tað, eg spurdi um, var, hví løgmaður ella umsitingin bara fór til Ríkið, tá eg metti, at løgmaður heilt náttúrliga átti at tosa við sínar kollegar í Danmark, forsætis-, uttanríkis- og verjumálaráðharra.

Niðurstøðan í fundarfrágreiðingini er eisini einføld: "Vísandi til tað, ið ført varð fram á fundinum og eftir áheitan frá nevndarformanninum, segði løgmaður, at hann fór at taka hetta málið upp í Danmark og í Nato, hvat málið nærmari snýr seg um!"

So einfalt var tað – og sjálvandi merkti hetta, at løgmaður kendi vanligu spælireglurnar og tók hetta málið upp við ella ígjøgnum danskar myndugleikar. Løgmaður vísti eisini sjálvur á fundinum til, at talan var um danskt málsøki og at føroyingar ongan myndugleika høvdu á økinum.

Hergeir í DV

Um kvøldið 8. február spyr John Sigurd Johannesen Hergeir Nielsen í DV, um tað er rætt, at undirritaði og Jóannes Eidesgaard "mæltu løgmanni til at fara uttanum donsku stjórnina.... og beinleiðis til Nato", og Hergeir Nielsen svarar, at "tað var ein samd nevnd, og teir báðir flokkarnir vóru eisini umboðaðir!"

Blóðskeivt og ikki sørt løgið, tá gerðabókin frá sama fundi umfataði 5 reglur uttan nakra niðurstøðu. Nevndin kundi annars ikki verið fullsamd, tí Fólkaflokkurin var als ikki umboðaður á fundinum.

Nakrar dagar seinni, kemur eitt notat, daterað 9 február, frá Sigmundi Isfeldt, ið var á fundinum í fylgi við løgmanni. Hetta er eitt sokallað innanhýsis arbeiðsskjal, sum varð sent limunum í nevndini, helst tí at ein limur eftirlýsti, um nakað annað referat varð tikið á fundinum enn tað hjá fasta skrivaranum. Hetta notat er ikki so frægt sum undirskrivað, og sær mistonkiliga bílagt út, tí Hergeir Nielsen við hesum á ein løgnan hátt lutvíst fær vart síni úttalilisi í SvF. Men hetta notatið verður kortini beinanvegin alment í bløðunum brúkt sum javnstillað og gildug fundarfrásøgn.

Í hesum notati verður sagt, at "Heðin Mortensen (fyrst Heðin Mortensen og Jóannes Eidesgaard tók undir við honum) hildu, at løgmaður átti at tosa við danska forsætisráðharran um málið, og um hetta ikki gevur nøktandi úrslit, so átti hann at venda sær

beinleiðis til Nato í Brússel!"

Hetta er fyrisovítt rætt, burtursæð frá orðinum beinleiðis. Tað er so ófatuliga sjálvsagt, at ein sambandsmaður ikki fer at biða ein loysingarløgmann fara uttanum danskar myndugleikar í slíkum máli. Tað er so ómetaliga sjálvsagt, at roknað varð við, at løgmaður brúkti vanliga mannagongd og kannaði málið gjøgnum donsku myndugleikarnar, sum umsita málið. Serliga tá sami løgmaður á sama fundi vísir á, at føroyskir myndugleikar ongan avgerðarrætt hava á økinum.

Sum sagt metti eg tað til fánýtis, at umsitingin gekk og rann uppi hjá Ríkisumboðnum, men metti, at løgmaður, sum væl er kunnugur við vanligu mannagongdina, tosaði við sínar kollegar í Danmark.

Og lat meg sláa fast, at hvørki fundarfrágreiðingin, seinni notatið, ella gerðabókin, nevna við einum orði, at Heðin Mortensen hevur biðið løgmann fara "uttanum" donsku stjórnina.

Irrelevant kjak

Sum sagt kundi nevndin sum heild ikki havt verið samd um nakað sum helst, tí hon var ikki fullmannað. Hetta forðar kortini ikki Jógvani Við Keldu, sum var burturstaddur, at gera egnar niðurstøður. Í Dimmu 17. február byrjar hann grein sína við orðunum, at tað er "ilt hjá mær at gera niðurstøðu", og nakrar reglur longri niðri skrivar hann "hinvegin havi eg gjørt mær tankar um fundin!"

Sjúrður Skaale – sum heldur ikki var við á fundinum - gartar eisini í bløðunum um málið, refererar til báðar frágreiðingarnar frá fundinum, hvaðani hann so hevur fingið fundarfrágreiðing og áðurnevnda innanhýsis arbeiðsskjal frá. Og aðrir politikkarar og Blaðmannafelagið eru við til at halda gongd í málinum við at blanda hetta saman við spurninginum um pressuetikkin hjá SvF.

Eg fari ikki at blanda meg uppí tað kjakið, tí pressuetikkurin hjá SvF er so bedøvandi irrelevantur fyri spurningin um, hvat veruliga fór fram í Uttanlandsnevndini.

Hergeir lýgur

Eg skal bara vísa á, hvussu ótrúliga snildisliga Hergeir Nielsen klárar at brúka onnur til inntøku fyri sítt egna mistak, og hvussu hann við bara einum orði klárar at reingja niðurstøðuna av fundinum í Uttanlandsnevndini. Í Dimmu skrivar hann, at hann í SvF vísti á, at nevndin bað løgmann venda sær til danir og Nato, at løgmaður vísti á tað sama, og at okkara fundarskrivari og Sigmund Isfeldt vístu á tað sama.

Hetta er púra rætt og tað veit alt Føroya fólk.

Men so skrivar hann: "Í SvF tórskvøldið sigur Jóannes Eidesgaard, at tað "yvirhøvur" ikki varð nevnt, at løgmaður skuldi venda sær til Nato". Hetta er ikki rætt, tí Jóannes avnoktaði pástandin um, at løgmaður skuldi fara beinleiðis til Nato!

Og 13. februar tekur Hergeir eisini løgmann til inntøku fyri sama pástand, tá hann vísir á úttalilsið frá løgmanni í SvF, har løgmaður sigur: "Altso, tað var heilt greitt, at øll nevndin meinti, at løgmaður skuldi fara aktivt inn í hetta málið, og, sum eg sigi tær, bæði stjórnin og Nato vórðu nevnd!"

Hetta er eisini púra rætt, men undirbyggir ikki lygnina hjá Hergeiri, tvørturímóti, tí løgmaður sigur ongastaðni, at hann varð biðin um at fara beinleiðis til Nato ella uttanum donsku stjórnina til Nato!

Totalt forvirraður

Niðurstøðan er púra greið. Eg reisti málið í Uttanlandsnevndini av teirri einfaldu orsøk, at eg ikki metti tað nøktandi, at einastu upplýsingar, nevndin fekk, vóru úrslit av samskifti millum umsitingina og Ríkisumboðið. Tí mælti eg løgmanni at fara víðari við málinum hjá sínum donsku kollegum. Og hesum tók Jóannes Eidesgaard undir við.

Og ein skal bæði vera illviljaður og steinbýttur at halda, at ein sambandsmaður fer at biða leiðaran fyri fullveldissamgonguni uppundir komandi fólkaatkvøðuna at seta donsku myndugleikarnar á økinum til viks, fara uttanum teir og beinleiðis til Nato.

Vit síggja eisini, at løgmaður longu dagin eftir fundin er so forvirraður av úttalilsunum hjá Hergeiri Nielsen, at hann sendir Uttanlandsnevndini skriv, har hann "heitir á nevndina at kunna løgmann skrivliga um, hvørji ráð nevndin hevur at geva løgmanni í hesum máli!" So vit síggja, at hóast Hergeir Nielsen brúkar úttalilsi løgmans sum inntøku fyri sínar lygnir, so hevur løgmaður onga avgjørda støðu, men eftirlýsir ráðum frá nevndini.

Og míni ráð til løgmans eru tey somu, sum á fundinum í Uttanlandsnevndini 8. február: Far sjálvur og kanna hetta málið hjá tínum kollegum í Danmark – far endiliga eisini til Nato, men ger tað gjøgnum teir stovnar og ráðharrastovur, sum sambært løgmanni sjálvum umsita hetta mál.

Rætting

Av misgávum, so eru orð dottin burtur í millum í seinasta partinum av viðmerking hjá Atla Dam, fyrrverandi løgmanni í fríggjadagsblaðnum. Vit endurprentað her seinasta brotið:

Hvussu fáa vit ábyrgdarfullar politikarar?
Høgni Hoydal hevur óteljandi ferðir ført fram, at "loysing" ella "frælsi" tryggjar okkum móti kreppum, skaptum av ábyrgdarleysum politikarum.

Dømini eru mong úr t.d. Afrika, at ongantíð gjørdist ábyrgdarloysið størri enn aftaná at londini fingu sokallað "frælsi", tí er tað ósakligt at billa fólki inn, at loysing tryggjar Føroyum ábyrdgarfullar politikarar.

Men tað er helst eisini ósakligt at nýta lond í Afriku til samanberingar, hóast Hvítabók ger tað.

Tað vit higartil hava fingið, er einaferð afturat politikarar, eitt nú Høgna Hoydal, sum eru til reiðar at klúgva føroysku tjóðina úr skalla í hæl við bert 1 atkvøðu í meiriluta. Tað er ikki ábyrgdarfult, men Høgnakratiskt.

Hetta málið skal loysast av 3/4 av løgtinginum við ikki minni enn 3/4 av fólkinum aftanfyri seg.

Longu nú fer ein óhugnaligur hatursgjóstur yvir landið. So haturskent tjak hava vit ikki sæð síðani 1945-48, fyrr enn nú meiningakanning var kunngjørd herfyri.

Hygg bara í gjár at spræningini, sum Sjúrður Skaale sendir, tann fitti maður hann var og vónandi aftur blívur.

Gamlamannadansur og 60-ára tónleikur í Sjónleikarhúsinum

TÍÐINDASKRIV

Føstulávintsleygarkvøld 24. feb. skipar GHM fyri dansikvøldið í Sjónleikarhúsinum. Bólkarnir sum spæla eru GHM og ENJOYERS. Dansurin byrjar kl. 22.00 og endar kl. 2.

GHM

Orkestrið, sum fyllir 80 í næsta ár, hevur gjøgnum tíðirnar spælt til nógv ymisk tiltøk sum td. konsertir, á stevnum, til fótbóltsdystir og eisini til dans.

Fyrr var vanligt at orkestrið av og á spældi til dans og tað munnu verða nógv, sum minnast GHM spæla til gamlamannadans í Sjónleikarhúsinum føstulávintsleygarkvøld.

Men traditiónin við dansinum datt so líðandi burtur, tá Sjónleikarhúsið misti dansigólvið. Og GHM hevði síni síðstu dansikvøld fyrst í 80-unum, á gamla Hotel Føroyar áðrenn tað bleiv selt.

Spæla nú aftur til dans

Millum jól og nýggjár í fjør skipaði GHM fyri dansi í Sjónleikarhúsinum. Tiltakið eyðnaist væl og gav orkestrinum mót uppá at royna aftur.

Við í orkestrinum verða umleið 25 spælarar og á skránni er góður gamal dansitónleikur, sum td. valsir, foxtrott, tango, quik step, samba og rock'n roll.

ENJOYERS

Hitt orkestrið, sum verður at hoyra leygarkvøldið, er eitt ektað 60-ára orkestur, ENJOYERS. Við í orkestrinum eru: Birgar Johannesen, Djóni Andreassen, Steingrím Abrahamsen, Hans Chr. Clementsen, Charles Gade og Fimmboði Lisberg.

ENJOYERS hava seinastu árini verið at hoyrt av og á. Av tiltøkum kunnu nevnast AFTURHVARV og AFTUR Í 60'INI, har teir so sanniliga havat sett sín dám á.

Á skránni hjá teimum verður góður poppur frá 60'unum.

Aftur í Sjónleikarhúsið

Tað hevur í nógv ár verið tørvur á einum dansihølið í Havnini fyri tey tilkomnu, sum hava hug at dansa. Tí er tað at gleðast um at lív er aftur er í dansinum í Sjónleikarhúsinum.

gult cyan magenta svart